LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 114/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bárði á Steig Nielsen, løgtingsmanni, um stýrisskipanarlógina

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Metir løgmaður, at ásetingin í Stýrisskipanarlógini § 54, stk. 2 er fylgd í málinum um at taka Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum?

Svar:

Eins og spyrjarin nevnir, so er ásett í stýrisskipanarlógini § 54, stk. 2, at landsstýrið skal ráðføra seg við uttanlandsnevndina í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

Hetta fer sjálvsagt at verða gjørt, tá ið landsstýrið fer undir slíkar samráðingar.

Men hagar er málið ikki komið. Talan er ikki um samráðingar enn, men bert at landsstýrið í sambandi við ríkis- og samstarvsráðsfundin í Føroyum í juni yvirskipað hevur greitt donsku stjórnini frá, at fimm av seks flokkum ynskja eina skipan, sum gevur Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir og byggir á samstarv millum javnbjóðis lond í einum felagsskapi.

Í Tinganesi, 26. juni 2025

Aksel V. Johannesen
løgmaður